# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Birgit og Rúni eru tey bestu

**Tað gjørdust teir báðir mest markantu spælararnir á greipuvinnandi liðunum hjá bæði kvinnum og monnum, ið struku avstað við hægsta heiðrinum á gallaveitsluni hjá flogbóltinum leygarkvøldið**

**FLOGBÓLTUR**
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Leygarkvøldið var stóra gallaveitslan hjá flogbóltinum hildin á 62ºN Airport Hotel oman fyri Sørvág, og har var lagið av tí besta undir borðhaldinum. Ikki minst fekk tað eina skrúvu aftrat, tá avdúkast skuldi, hvørji høvdu fingið teir ymsu heiðrarnar, flogbóltsárið altíð endar við.

Størstur var spenningurin, tá komið var til heiðurin »Ársins leikarar«. Borðstjórin, Jørgen Niclasen, kunngjørdi fyrst, at hjá monnum var tað Rúni Weihe í ÍF, og síðani, at hjá kvinnum var tað Birgit Guttesen í SÍ. Aftaná fingu vit orðið á tey bæði, ið vóru sera fegin um heiðurin:

– Eg havi roynt hetta fyrr, og tað er altíð líka stuttligt at fáa eitt herðaklapp frá hinum spælarunum. Nú hevur tað gingið sera væl hjá okkum, tí vit hava vunnið alt, sum er at vinna, so hetta er sum at fáa ein bonus omaná, sigur Rúni Weihe.

Hann hevur verið sera sjónskur á liðnum hjá ÍF, nú hann eftir fleiri ár í Norra aftur hevur spælt eitt ár í føroyskum flogbólti. – Jú, tað hevur gingið væl. Tað kann eg nokk ikki lúgva meg frá, staðfestir hann.

### Fyrstu ferð

Hetta kappingarárið í flogbólti hevur Birgit Guttesen somuleiðis verið ein markantur spælari á kvinnuliðnum hjá SÍ, sum frá í fjør at vinna sítt fyrsta meistaraheiti, í ár tók bæði meistaraheitið og vann steypafinaluna.

– Hetta er ordiliga deiligt. At fáa at vita, at tú ert ein góður spælari, gevur eitt lítið »kick« eyka. Og at fáa henda heiðurin ger, at tú vilt spíla teg enn meira út næsta ár, sigur ársins besti spælari hjá kvinnunum, sum ikki heldur tað vera so løgið, at tað eru greipuvinnararnir, ið eiga bestu spælararnar.

– Nei, tað er tað kanska ikki. Men at tað var eg, sum skuldi blíva ársins spælari, kemur eitt sindur bak upp á meg. Hjá mær persónliga hevur tað gingist óvanliga væl til tíðir í vetur, men tað hevur nú ikki altíð gingið líka væl, er eyðmjúka viðmerkingin frá Birgit.

Á ein hátt var tað longu fyrr um kvøldið undir gallaborðhaldinum lagt upp til, at júst Birgit og Rúni skuldu fáa heiðurin, tí frammanundan vóru bæði vald til bestu álopsspælarar í kappingini. Ofta eru tað tey, ið markera seg í álopsspælinum, ið enda við størsta heiðrinum, og so var eisini hesa ferð.



*Ársins bestu spælarar hetta kappingarárið í flogbólti: Birgit Guttesen í SÍ og Rúni Weihe í ÍF*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir*



## Ársins bestu 2008/09

**Hesi eru tey, sum leygarkvøldið blivu heiðrað sum tey bestu í flogbóltinum í vetur:**

**Ársins hevari**
Kvinnur: Annika á Stongum, SÍ
Menn: Hans Fróði Jensen, Fleyr

**Ársins blokkleikari**
Kvinnur: Sóley Poulsen, KÍF
Menn: Suni Juul Pedersen, Fleyr

**Ársins álopsleikari**
Kvinnur: Birgit Guttesen, SÍ
Menn: Rúni Weihe, ÍF

**Ársins verjuleikari**
Kvinnur: Margit Joensen, Mjølnir
Menn: Hjalmar Joensen, Fleyr

**Ársins stjørnuskot**
Kvinnur: Anja Danielsen, Fleyr
Menn: Emil Mikkelsen, SÍ

**Ársins venjari**
Kvinnur: Jóhan Petur á Stongum, SÍ
Menn: Boban Ilic, ÍF

**Ársins leikari**
Kvinnur: Birgit Guttesen, SÍ
Menn: Rúni Weihe, ÍF